gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Heri fekk 13 í oljufrøði

**Heri á Rógvi fekk karakterin 13 í oljufrøði, sum er nýggj lærugrein í studentaskúlanum. Hann mátti knossast fyri 13-talinum, og hann las at kalla alt samdøgrið uppundir próvtøkuna. Heri valdi oljufrøði, tí hetta er nýggj og spennandi lærugrein, nú Føroyar standa fyri eini komandi oljuvinnu**

PISUR
*Stefan í Skorini*



*Heri á Rógvi fekk tvey 13 tøl til munnligu royndirnar – í oljufrøði og søgu. Hann las alt samdøgrið upp til próvtøkuna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

18 ára gamli Heri á Rógvi av Argjum hevur júst fingið húgvuna, og nú kann hann kalla seg rættiligan student. Hann man eisini vera fegin um prógvið, tí har finnast tvey 13 tøl. Hann fekk 13 til próvtøkuna í oljufrøði og søgu.

Oljufrøði er nýggj lærugrein, og hetta er aðru ferð, at próvtøka er í henni.

– Eg valdi oljufrøði, tí tað er ein nýggj og spennandi lærugrein, sum sameinir fleiri ymiskar tættir, og tað ger hana áhugaverda. Eisini er oljufrøði viðkomandi, nú ein oljuvinnan væntandi ger innrás í Føroyum, sigur Heri á Rógvi.

### Tveir lærarar

Av tí at oljufrøði nemur við fleiri ymiskar tættir, er neyðugt at hava tveir lærarar, sum taka sær av hvør sínum øki.

– Tað hevur riggað væl við tveimum lærarum. Lærugreinin er býtt í tríggjar bólkar. Teir eru jarðfrøði, olja og samfelag og oljutøkni, sigur Heri.

Lærararnir Katrin Thomassen, sála, og Heini Eysturoy høvdu flokkin frá byrjan av, men tá Katrin Thomassen brádliga fór, tók Hans Holm við.

Tað eru ikki nógvir næmingar, ið velja oljufrøði. Bara sjey næmingar fóru til próvtøku í lærugreinini. Orsøkin til hetta er, at bara støddfrøðiligir studentar í 3. flokki kunnu velja oljufrøði. Eisini er lærugreinin nýggj og ókend, og tí halda fleiri seg aftur í at velja hana.

Heri sigur, at næsta ár verður hetta væntandi broytt, so at málsligir studentar eisini kunnu velja oljufrøði.

### Las nógv

Heri sigur, at hann og tey í flokkinum lósu ógvuliga nógv til royndina. Tey høvdu sokallaðar lesibólkar, har tey lósu næstan alt samdøgrið undan royndini. Hetta hevur eisini givið úrslit.

– Av tí at oljufrøði var tann fyrsta royndin, so var góð tíð til at lesa, og vit brúktu nógva tíð til tað. Eg las at kalla alt samdøgrið, sigur Heri.

Heri skuldi greiða frá um olju- og gassreservoir, tá hann fekk 13-talið.

– Eg royndi at vera sjálvstøðugur undir royndini og at taka initiativið sjálvur. Eg helt meg vita tað mesta á økinum, og tað gekk bara væl, sigur Heri.

Heri hevur ikki hugsað um at taka eina víðari útbúgving innan oljuvinnu, og hann hevur ikki avgjørt enn, hvønn lesnað hann fer undir um eitt ár, tá hann ætlar sær víðari.

# Lemvig Kamarkór á vitjan

**Kamarkórið úr Lemvig hevur konsertir í Fuglafirði, Klaksvík og Havn um vikuskiftið. Á konsertunum luttaka eisini føroysk kór**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



*Lemvig Kamarkór vitjar í Føroyum komandi dagar, og um vikuskiftið verða konsertir í Fuglafirði, í Havn og í Klaksvík*

Um vikuskiftið vitjar Lemvig Kamarkór í Føroyum, og kórið fer at syngja á konsertum í Fuglafirði, í Havn og í Klaksvík.

Fríggjakvøldið verður konsert í Fuglafirði, har Fuglafjarðar Sangfelag eisini fer at luttaka. Leygardagin klokkan 11.00 verður kórið úr Lemvig í SMS, og sunnukvøldið verður konsert í Klaksvík, har 17 sangarar eisini verða við.

Fyri nøkrum árum síðani fóru Klaksvík og Fuglafjørður við í samstarv, sum verður kallað Vestnorden. Hetta mentanarliga samstarvið fevnir um Lemvigøkið í Danmark, Tynset-Alvdal í Noregi og so Klaksvík og Fuglafjørð.

Júst í hesum døgum hava umboð fyri Klaksvík og Fuglafjørð verið á mentanarvitjan í Tynset-Alvdal.

### Evnaríkur kórleiðari

Í fjør kom Lemvig Kamarkór við eini fløgu undir heitinum »Over Jylland«, har sangirnir eru vakrir fosturlandssangir – millum annað »I Danmark er jeg født« og »I skovens dybe stille ro«.

Kórleiðari er Erling Lindgren, sum er útbúgvin organistur frá Jydske Musikkonservatorium í Århus. Hann er evnaríkur tónasmiður, orgulsolistur, kórleiðari og jazzpianistur.

Lemvig Kamarkór varð stovnað í 1995, og umframt nógvar konsertir var kórið við í sjónvarssendingum hjá DR, sum vóru kallaðar »Vers og viser om Vorherre«.

Meðan Lemvig sendir eitt kór hendan vegin at syngja, hava fleiri føroysk fótboltsfeløg júst í hesum døgum sent fótbóltslið til Lemvig at verða við í stórari altjóða fótbóltskapping har.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Vestmenningar fáa fleiri tímar

**Rokið um Vestmanna skúla er av. Skúlin hevur eftir fund við embætisfólk í Mentamálastýrinum fingið játtað fleiri tímar til komandi skúlaár. Men játtanin er framvegis ov lítil**

FÓLKASKÚLIN
*John Johannessen*





*Vestmanna skúli hevur nú fingið fleiri tímar, so hann kann býta árgangirnar upp í flokkar. Men játtanin er sambært skúlastjóranum, Jóannes Fonsdal, framvegis ikki nøktadi*

*Mynd: John Johannessen*

Vestmanna skúli fær nú fleiri tímar játtaðar til komandi skúlaár.

Hetta er komið í lag, eftir at Tórbjørn Jacobsen fór úr sessinum sum landsstýrismaður í mentamálum. Skúlaleiðslan varð fyri stuttum boðin á fund við embætisfólk í Mentamálastýrinum, og fekk hon har tilsøgn um fleiri tímar.

– Vit hava fingið tímar afturat, men kortini ikki so nógvir, at tað er nøktandi. Men trupulleikin er, at Mentamálastýrið fær ikki játtað okkum fleiri tímar, innan fyri teir fíggjarligu karmar, sum fólkaskúlin hevur fingið, sigur Jóannes Fonsdal, skúlastjóri.

### Ov fá tilboð

Jóannes Fonsdal sigur, at skúlin við nýggju tímajáttanini fær býtt árgangirnar í flokkar. Men hann hevur kortini ongan møguleika at veita næmingunum í tíggjuna flokki tey tilboð, sum fólkaskúlalógin krevur.

Fólkaskúlalógin krevur nevniliga, at hvør næmingur skal fáa 28 tímar tilsamans, og skulu hesir vera býttir yvir tær lærugreinir, sum einstaki næmingurin krevur. Tí krevur hetta nógvar lærarakreftir og fleiri lærugreinir at velja ímillum hjá einstaka næminginum.

– Men tað er ikki møguligt hjá okkum at hava nóg nógv tilboð, til at allir næmingarnir í tíggjunda flokki fáa teir kravdu 28 tímarnar. Tí mugu vit fáa undantaksloyvi frá Mentamálastýrinum til at hava færri tímar, greiðir Jóannes Fonsdal frá.

### Tvey sløg av skúlum

Skúlastjórin í Vestmanna heldur, at skipanin, sum skúlarnir í dag fáa tímar játtaðar eftir, ger, at vit fáa tvey sløg av skúlum – fyrsta floks skúlar og annan floks skúlar.

Skúlarnir fáa nevniliga tímar játtaðar fyri hvønn einstaka næmingin í staðin fyri hvønn einstaka flokkin. Og ger hetta, at smærru skúlunum altíð vantar tímar, og avleiðingin verður, at teir ikki fáa bjóðað nøktandi tilboð til næmingarnar.

# Búskaparpolitikkurin hepnast væl

**Búskaparráðið heldur, at tað hevur hepnast væl hjá politiska myndugleikanum at halda avlop landskassans á einum høgum støði, eins og tað eigur at vera í góðum tíðum**

BÚSKAPUR
*John Johannessen*

Tað hevur eydnast landsstýrinum at varðveita eitt rímiliga stórt avlop, sum er neyðugt í hesum tíðum.

Hetta staðfestir Búskaparráðið í frágreiðing síni fyri várið 2001.

Búskaparráðið vísir á, at avlopið lættiliga kundi verið farið í størri almenna nýtslu ella minkaðar almennar inntøkur, men at tað samanumtikið tó hevur hepnast væl at halda avlopinum á høgum stigi.

»Hóast tørvur er á at útbyggja almennar tænastur, so má støðið takast í búskaparliga heildarsamanhanginum – eru tíðirnar so góðar, sum tær hava verið seinastu árini, eigur stórt avlop at vera hjá tí almenna.

### Minni avlop

Búskaparráðið vísir á, at landskassin í 2000 hevði eitt rakstrar-, íløgu- og útlánsúrslit á umleið 602 millónir krónur. Hetta er umleið 46 milliónir minni enn í 1999, men hetta er sambært Búskaparráðnum framvegis eitt stórt avlop, sum tað sømir seg í góðum tíðum.

Men Búskaparráðið vísir eisini á, at almennu rakstrarútreiðslurnar øktust úr 1.839 milliónum krónum í 1999 upp í 2.120 milliónir krónur í fjør. Ráðið sigur, at henda øking serliga kom av øktum løngjaldingum, umleið 95 milliónir, og øktar útreiðslur til keyp av vørum og tænastum, umleið 180 milliónir krónur. Somuleiðis øktust, rakstrarinntøkurnar úr 398 milliónum krónum upp í 585 milliónir krónur, stórt sæð vegna øktar inntøkur frá sølu av vørum og tænastum.

Sambært ráðnum koma broytingarnar í rakstrarstøðinum av, at stovnar, sum hava ligið uttan fyri landsroknskapin, í fjør komu inn í hann.. Sum dømi nevnir ráðið Apoteksverkið, sum fær rakstrarinntøkurnar at hækka við nærum 60 milliónum krónum.

Íløgurnar hjá Landskassanum øktust úr 135 milliónum upp í 174 milliónir krónur, tað er ein vøkstur upp á 48 prosent.

